# Kemilux Industri ISO-9001 góðkenning



*Jóhanna Zachariasen, góðskuleiðari hjá Kemilux Industri, Símun Hammer, frá Sp/f Virkisráðgeving, Andrass Joensen, frá Det Norske Veritas, og Debes Petersen, stjóri á Kemilux Industri*

**Í sambandi við at P/f Kemilux Industri hevur fingið ISO-9001 góðkenning, var móttøka í Mykinesgøtu fríggjadagin 18. februar. Tilsamans 14 fólk arbeiða hjá Kemilux Industri**

MÓTTØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í fleiri mánaðir í fjør gjørdu starvsfólkini hjá Kemilux Industri eitt miðvíst arbeiði við at fáa fyritøkuna ISO-9001 góðkenda, og 16 desember 2004 fekk fyritøkan hesa góðkenning. Fríggjadagin 18. februar fekk fyritøkan handað diplomið við ISO-9001 góðskugóðkenningini og í hesum sambandi var móttøka í Mykinesgøtu.

ISO-9001 góðkenningin hevur stóran týdning fyri Kemilux Industri, sum umframt heimamarknaðin eisini útflytur sína framleiðslu til eitt nú Danmark, Norra, Ísland, Skotland og Kanada.

Tað er Jóhanna Zachariasen, góðskuleiðari, sum saman við Sp/f Virkisráðgeving í Saltangára, hevur hevur staðið fyri arbeiðinum við góðkenningini.

Det Norske Veritas góðkenna og sertificera fyritøkur, sum verða ISO-9001 góðkendar.

Kemilux Industri hevur fingið fíggjarligan stuðul frá oljufelagnum BP-Amoco til ISO-9001 góðkenningina.

Stjóri á Kemilux Industri er Debes Petersen, og Arni Gunnarsson er sølustjóri. Tilsamans 14 fólk arbeiða í fyritøkuni. Søludeildin og goymslan eru á Hjalla, meðan framleiðslan er í Mykinesgøtu.



*Ein væl nøgd Jóhanna Zachariasen, sum fekk blómur frá stjóranum fyri væl úr hondum greitt arbeiði*



*Fríggjadagin var móttøka hjá Kemilux Industri í Mykinesgøtu. Arni Gunnarsson sølustjóri er uttast til høgru*

## Fa. Ageware – nýtt teldufirma í Klaksvík

TÍÐINDASKRIV

Fa. Ageware er eitt nýtt firma í Klaksvík, sum ger ymisk telduprogramm til privatfólk og aðrar brúkarar.

Teir hava gjørt fleiri telduprogramm sum t.d. "Time Player 1", "Single Chating" (vision 1), og arbeiða í løtuni við "Single Chating" (vision 2), og "Light dos 0,5", sum er eitt venjingarprogramm til at læra børn at lesa og rokna.

Fólk eru vælkomin at koma til okkara við sínum ynskjum, so gera vit programmini eftir tørvi, sigur Theodor Sólbjørg frá Fa. Ageware tel. 274669 (millum kl 18 og 22).